## Meira glíming enn fótbóltur

Sunnudagin spældu Atli Danielsen og liðfelagarnir í Frem á útivølli ímóti Thisted í Vestur-Jútlandi. Í dystinum, sum endaði við javnleiki 2-2, fekk Atli Danielsen reytt kort, og harvið leikbann í teimum báðum komandi dystunum hjá Frem. Venjarin hjá Frem, Anders Theil segði við 4-4-2, at hann heldur, at teir í Frem vóru hepnir bert at fáa ein mann útvístan. - Summir av mínum spælarum hildu eftir øllum at døma, at talan var um ein glímingardyst, og ikki ein fótbóltsdyst, segði ein heldur hvassorðaður og speiskur Frem-venjari, aftaná dystin í Thisted.



## Benitez gevur ikki upp

Hóast 4-4 javnleikin móti Arsenal, hvur Raael Benitez ikki minst vónina um at vinna enska meistaraheitið í fótbólti. – Eg veit, at hetta gevur Manchester United ein góðan møguleika, men tað hava teir eisini havt fyrr. Mínir spælarar vóru keddir eftir dystin, men Arsenal skal eisini til Old Trafford, og tað kann væl vera, at teir eisini skapa sær eitt gott úrslit har.

# Aksel gjørdist meistari

**Tað tók sína tíð, men leygardagin eydnaðist tað loksins Aksel Poulsen at vinna FM-heitið í badminton, eftir at hann í trimum spennandi settum basti Absalon Eysturoy**

**BADMINTON**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Leygardagin varð stóri finaludagurin fyri badminton, judo og borðtennis hildin í Badmintonhøllini í Havn.

Undan finaluni var stórt fokus á einmansleikinum hjá monnum, har feltið var meira opið enn nakrantíð, nú Niklas Eysturoy varð noyddur at geva avboð.

Her stóð finaludysturin ímillum Aksel Poulsen og Absalon Eysturoy, og gjørdist talan um ein sera spennandi dyst, har teir báðir skiftust um at hava yvirvág. Men har Aksel tó átti størsta yvirskotið, tá avgerandi bóltarnir skuldu sláast.

Hjá kvinnunum var sum væntað eingin ivi. Og tó at Guri Poulsen beit væl frá sær í næsta settinum, so var hon ongan tíð veruliga í nánd av at hótta Sigrun Smith.

Úrslitini í einstøku kappingunum framganga av yvirlitinum niðanfyri.



*Aksel Poulsen hevur fleiri ferðir áður verið partur av FM-finaluni, men sigurin leygardagin var hansara fyrsti*




*Sigrun Smith er sannur fongur hjá føroyska landsliðnum, sum fer at royna seg á Álandi um tveir mánaðir*

**Tvímansleikur hjá kvinnum**
1 Sigrun Smith/ Guri Poulsen
2 Brynhild D. Carlsson/ Rannvá D. Carlsson

**Tvímnasleikur menn**
1 Absalon Eysturoy/ Aksel Poulsen
2 Rógvi Poulsen/Flóvin Mikkelsen

**Blandaður tvímansleikur**
1 Rannvá D. Carlsson/ Aksel Poulsen
2 Sigrun Smith/ Absalon Eysturoy

**Einmansleikur kvinnur**
1 Sigrun Smith
2 Guri Poulsen
3 Brynhild D. Carlsson

**Einmansleikur menn**
1 Aksel Poulsen
2 Absalon Eysturoy
3 Rógvi Poulsen

**Gentur U9**
1 Ingibjørg Olsen, VÍF
2 Marjun Niclasen, VÍF
3 Petra Ingebrichtsen, VÍF

**Dreingir U9**
1 Dan Fróðason, MBF
2 Karl Heri Brodersen, HBF
3 Olgar Fugløe, KBF

**Gentur U11**
1 Angela Petersen, MBF
2 Betti Eyð Ellingsgaard, MBF
3 Jóna Jensen, ÍF

**Dreingir U11**
1 Jákup N. Olsen, ÍF
2 Jákup Jacobsen, ÍF
3 Janus Samuelsen, MBF

**Gentur U13**
1 Kristina Eriksen, HBF
2 Hanna Poulsen, ÍF
3 Sólfríð Poulsen, VÍF

**Dreingir U13**
1 Sámal Joensen, ÍF
2 Martin Justinussen, HBF
3 Aron Cornette, ÍF

**Gentur U15**
1 Rannvá D. Carlsson, HBF
2 Helena Lamhauge, HBF
3 Svanna Poulsen, VÍF

**Dreingir U15**
1 Arnold Kristiansen, ÍF
2 Magni Hansen, ÍF
3 Poul Magnus Petersen, ÍF

**Kvinnuunglingar**
1 Birita Poulsen, VÍF
2 Hanna Elisa Óladóttir Arge, HBF
3 Sigrið Dalsgarð, HBF

**Mansunglingar**
1 Ari Ó. Ellingsgaard, ÍF
2 Ellindur G. Magnussen, HBF
3 Andreas Poulsen, HBF

**Oldboys einmansleikur**
1 Herman Eysturoy HBF
2 Michael Gram MBF
3 Zacharias Thomassen HBF

**Oldboys tvímansleikur**
1 Michael Gram/ Henrik Petersen, HBF
2 Jóhannes Ellingsgaard/ Herman Eysturoy, HBF
3 Høgni Carlsson/ Yngvi Guttesen, HBF